# Í NÝGGJU VALMYNDINI ERU HESI ØKI:

**Yvirlit** gevur tær eina samlaða mynd av tínum kontum. Tú gert av, hvussu tínar kontur skulu síggjast í yvirlitinum. Um tær skulu vísa tær seinastu bókingarnar ella ikki. Samstundis er Yvirlitið ein skjót leið til at rinda rokningar og flyta pening.

**Gjaldingar** er útbakkin hjá tær og atgongdin til at rinda rokningar og flyta pening. Her kanst tú eisini rokna gjaldoyrakostnað.

**Íløgur** er eitt nýtt univers, sum verður tøkt tann 6. desember, og gevur tær møguleika at keypa og selja virðisbrøv beinleiðis á telefonini, og halda eyga við tínum íløgum.

**Samband** er beina leiðin til at sperra kort, og til at finna okkara deildir og sjálvtøkur.

# NÝGGJAR FUNKUR OG NÝGGIR MØGULEIKAR

Nú er Netbankin sum app enn snildari.



NORÐOYA SPARIKASSI

# VÆLKOMIN TIL NÝGGJA NETBANKAN SUM APP

Vælkomin til nýggju og dagførdu útgávuna av Netbankanum. Vit hava gjørt hann meira hugskygdan, soleiðis at tú hevur tær funkur, sum tú brúkar mest, beint við hondina og lættliga fært yvirlit, eitt nú yvir tínar kontur.

Nýggja valmyndin hevur eina røð av ímyndum – sokallað univers – sum hvør sær rúma tær upplýsingar, sum tú vanliga finnur í valmyndini. Í valmyndini eru hesi univers: Yvirlit, Gjaldingar, Íløgur og Samband.



NORÐOYA SPARIKASSI



# YVIRLIT – TIL TÍN TØRV

Tá tú stendur í einum universi, ber til at síggja allar tilhoyrandi upplýsingar og funkur í kassunum niðanfyri. Tú gert av, um tú vilt hava allar smálutirnar sjónligar, ella heldur hava eitt einkult yvirlit í hvørjum universi sær. Næstu ferð, tú ritar inn, minnist appin, hvat tú hevur valt.

Vónandi fært tú gleði av nýggja netbankanum. Hann verður mentur alla tíðina, so tú fært møguleika at tilevna júst ta loysn, sum tú vilt hava.